# ítróttur

Nr. 152 • fríggjadagur • 12. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Taptu stórt á heimavølli

MK Gorica gjørdi í síðstu viku enda á europeiska æventýrinum hjá FCK. Tað gjørdu teir við at vinna við ikki minni enn 5-0 í Parkini í Keypamannahavn.

Men einki bendir á, at slovenska meistaraliðið skal røkka milliónunum, sum eru at vinna í bólkaspælinum í Europa Cup kappingini fyri meistarlið. Mikukvøldið høvdu teir vitjan av Monaco, sum vann 3-0. Hóast Gorica ímóti FCK vísti, at teir eru førir fyri at vinna tað aftur á útivølli, sum teir høvdu mist á heimavølli, so man tað vera lítið sannlíkt, at Monaco, sum í fjør rakk finaluni í hesi kappingini, ikki fer at verða ført fyri at steðga slovenska liðnum.

*jh*

# Hjalgrím skoraði tvær ferðir

**Fyri fyrstu ferð í mong ár eydnaðist tað mikukvøldið Fremad Amager at spæla seg víðari í donsku steypakappingini**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*



Mikukvøldið var Fremad Amager í øðrum umfari í donsku steypakappingina inni á Sjællandi. Mótstøðuliðið var Sorø Freja, sum spælir í Sjællandsseriuni.

Fremad Amager vann 4-1, og Hjalgrím Elttør skoraði tvey av málunum. Hjalgrím var annars ikki á besta liðnum, tá ið Fremad Amager í vikuskiftinum spældi í landskappingini.

Hjalgrím skoraði til 2-0 í 22. minutti. Miðskeiðis í 2. hálvleiki økti hann til 4-0. Andrew av Fløtum varð settur inn á liðið beinanvegin eftir steðgin, og Jann Ingi Petersen var á miðvøllinum í umleið ein tíma, áðrenn hann varð tikin út.

- Eg var uttast á miðvøllinum í høgru í 1. hálvleiki og uttast á miðvøllinum í vinstru í 2. hálvleiki. Fyrra málið skoraði eg við vinstra beini eftir uppspæl í vinstru og diagonalsending. Seinna málið fekk eg eftir returbólt frá málverjanum. Vit vóru væl betri enn teir, og vit kundu havt vunnið størri sigur, eitt nú um eg hevði havt verið skarpari. Eg hevði fleiri aðrar møguleikar at gera mál, sigur Hjalgrím Elttør.

Tú vart als ikki við í vikuskiftinum?

- Nei, tað eru nógvir við í kappingini, og venjarin skiftir nógv út. Eg dugi ikki at siga, hvussu nógv eg sleppi at spæla, men nú vóni eg sjálvandi, at eg sleppi upp í part í vikuskiftinum.

Fremad Venjarin sigur, at hann hevur umleið tjúgu spælarar, sum allir eru mest sum eins góðir. Fyrr í vikuni fóru tveir spælarar úr felagnum og til onnur feløg. Teir hava ikki verið á besta liðnum síðani summarsteðgin, og teir sóu sær ikki møguleikar at koma á besta liðið.

Mikukvøldið var Vejle á útivølli í Odense. Tað eydnaðist felagnum hjá framvegis skadda Christian Høgna Jacobsen at vinna 2-1 á OKS ella Odense Kammeraternes Sportsklub, sum spælir í Fynsseriuni.

Mikudagin 25. august verður triðja umfar á skránni, og tá skulu Jón Rói Jacobsen og Frem og Johan Byrial Hansen og Horsens upp í leikin. Todi Jónsson og FCK skulu fyrstu ferð spæla í fimta umfarinum, sum verður 27. oktober.

Seks av teimum átjan spælarunum, sum hava fingið landsliðsboð, eru útisetar í Danmark. Teir eru Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum og Jann Ingi Petersen úr Fremad Amager, Johan B. Hansen úr Horsens, Jón Rói Jacobsen úr Frem og Todi Jónsson úr FCK. Hesir skulu í vikuskiftinum spæla í donsku landskappingini, og so koma teir heim fyrrapartin mánadagin. Landsdysturin verður mikudagin ímóti Malta.

# Jákup hevur givið avboð

**Bárður Johannsen, sum fyri stuttum kom fyri seg eftir drúgvan skaðasteðg, fekk í gjár boð um, at hann skal vera við ímóti Malta**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen hevur givið avboð til landsdystin ímóti Malta. Vøddaskaðin, sum hann fekk, tá ið ein ikki so long løta var eftir at dystinum ímóti B36 sunnudagin, er so mikið álvarsamur, at hann fer at halda Jákupi burturi frá fótbólti í hvussu so er í einar tvær vikur afturat.

- Eg havi ikki rættuliga verið førur fyri at ganga. Nú havi eg verið hjá fysioterapeuti tvær ferðir, og tað kennist dagamunur á. Í morgun havi eg fingið gingið, og fysioterapeuturin sigur seg rokna við, at tað í vikuskiftinum fer at bera mær til at jogga. Men tað ganga nakrir dagar, áðrenn eg aftur fari at verða førur fyri at venja og spæla fótbólt, segði Jákup Mikkelsen fyrrapartin í gjár.

Í steypakappingini tíðliga í vár varð Jákup plágaður av sama skaða. Tá gekk tað skjótt fyri seg hjá honum at koma fyri seg aftur. Ongantíð frammanundan hevur hann havt hetta slagi av skaða. Í síni tíð í Herfølge og eisini í Molde hevði Jákup okkurt skifti trupulleikar við aðrari mjødnini, men nú er langt síðani, at hetta darvaði.

Verður tú førur fyri at spæla ímóti Sveis og Fraklandi í HM undankappingini?

- Tað vóni eg, men í løtuni hugsi eg fyrst og fremst um at verða klárur aftur, so eg kann hjálpa KÍ. Tað er greitt, at eg verði ikki førur fyri at spæla á Eiði nú sunnudagin, og eg verði neyvan førur fyri at spæla í Gøtu annan sunnudag.



Andreas Johannesen hevur staðið seg væl í 2. deild. Hann hevur ikki nógvar royndir í 1. deild. Hann spældi fimm minuttir ímóti FCK, men vit hava álit á honum og vóna, at tað fer at ganga væl hjá honum, sigur Jákup Mikkelsen.

### Bárður næstur í røðini

Eftir at Jákup Mikkelsen hevur boðað landsliðsvenjaranum frá, at hann ikki verður førur fyri at spæla ímóti Malta mikudagin, hevur Henrik Larsen gjørt av, at Bárður Johannsen, málverjin hjá HB, skal møta saman við hinum landsliðsspælarunum mánadagin. Saman við honum er Jens Martin Knudsen málverji.

Bárður hevur verið triði málverjin á landsliðnum seinastu árini. Tað mesta av hesum kappingarárinum hevur hann verið skaddur. Nú er hann komin fyri seg aftur. Hann vardi HB málið í steypafinaluni, og hann hevur verið í HB málinum í teimum báðum landskappingardystunum, sum hava verið síðani summarsteðgin.

Bjarni Johansen hevur staðið seg ógvuliga væl í VB málinum í ár. Ikki minst ímóti NSÍ var hann rættuliga stinnur. Men venjarin hevur valt at halda fast við sama triðja málverjan, sum seinastu tíðina hevur havt henda kjansin.



DR-stjórin um ÚF/SVF:

# Samstarv betrar um góðskuna



*- Við samanleggingum økjast møguleikarnir at gagnnýta tilfeingi til fulnar, og orkan kann koordinerast effektivari. Vit á DR høvdu stórt sæð sama budget fyri tíggju árum síðani, sum vit hava í dag, og vit framleiða tvífalt so nógv tilfar. Hetta sigur eitt sindur um, at bæði meiri og betri tilfar kann fáast til vega, um nøkur felags tøk verða tikin, sigur aðalstjórin á Danmark Radio, Christian S. Nissen*

*Mynd: Jan Müller*

**– Okkara royndir vísa, at samanleggingar økja um møguleikarnar at gagnnýta felags tilfeingi meiri effektivt. Við at økja um samstarvið millum útvarp og sjónvarp fæst eitt fakliga sterkari umhvørvi við meiri kvalitativum journalistikki, sigur aðalstjórin á Danmark Radio, Christian S. Nissen, nú Útvarp og Sjónvarp Føroya leggja saman**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini, heini@sosialurin.fo*

Danmark Radio (DR) hevur seinastu fimm árini økt munandi um samarbeiðið millum útvarps- og sjónvarpsframleiðslu. Fram til fyrst í 90´unum arbeiddu útvarps- og sjónvarpsfólk tætt saman. Síðani vórðu framleiðslurnar skildar sundur fyri tíggju árum síðani, áðrenn leiðslan á DR fyri fimm árum síðani aftur tók eina vend og integreraði útvarps- og sjónvarpsframleiðslu við øktum samstarvi.

DR hevur stórt sæð sama budget í dag sum fyri 10 árum síðani, men kortini verður í dag framleitt tvífalt so nógv tilfar. Sambært Christian S. Nissen, aðalstjóra á DR, er økta samstarvið og integratiónin millum útvarp og sjónvarp ein orsøk til framburðin, og hann metir, at samanleggingin av ÚF og SVF kann skapa ein betri loftmiðlaheim í Føroyum.

## Góðska framum kapping

Christian S. Nissen sigur fyrst og fremst, at hann ikki hevur nakra kategoriska støðu til samanleggingina av ÚF og SVF, tí alt veldst sjálvsagt um, hvussu uppgávan í praksis verður hagreidd eftir 1. januar og komandi árini.

Men Nissen hevur nógvar royndir frá sínum arbeiðsumhvørvi á DR, og har hevur talan sambært honum verið um økt samstarv og alsamt tættari tilknýti millum útvarp og sjónvarp seinnu árini.

- Okkara royndir eru, at vit hava fingið eitt fakliga sterkari umhvørvi, tá vit hava lagt redaktiónir og deildir saman. Vit hava t.d. eina felags mentanardeild við útvarps- og sjónvarpsframleiðslu, og úrslitið er einfalt betri og meiri gjøgnumarbeiddar mentanarsendingar, tí vit í felag gagnnýta alt okkara tilfeingi meiri effektivt, sigur Christian S. Nissen. Hann heldur, at við felags samstarvi á praktiska og tekniska økinum, samstundis sum øll vitan verður gagnnýtt til fulnar, fær kundin borðreitt kvalitativari journalistikk.

Men tað er ikki bert á mentanarøkinum, at samstarvið á DR er økt. Tíðindaredaktiónirnar hjá útvarpi og sjónvarpi arbeiða í ein mun saman, hóast framleiðslurnar í løtuni fara fram í hvør sínum bygningi. Nýggir bygningar standa í løtuni í gerð, og tá teir eru lidnir um hálvt annað ár, verða tíðindaredaktiónirnar eisini undir sama taki.

- T.d. hava vit í løtuni felags research umhvørvi og felags arkiv á tíðindaøkinum, og um vit hava stórtíðindi at bera í sjónvarpstíðindunum, fær útvarpið eisini somu tíðindini og fer mangan í luftina við teimum áðrenn sjónvarpið, sigur Christan S. Nissen.

Júst á hesum øki íkemur ein viðkomandi spurningur fyri loftmiðlaleiðsluna og politiska myndugleikan í Føroyum, nevniliga kappingin og tíðindafjølbroytnið. Aðalstjórin ásannar, at økt samstarv millum útvarps- og sjónvarpsfólk skerjir kappingina og skaðar fjølbroytnið, men hinvegin er vinningurin við øktum samstarvi kanska størri, enn missturin er.

- Tað týdningarmiklasta og mest avgerandi er fakliga góðskan á vøruni, sum kundin fær. Hóast vit ikki hava sama fjølbroytnið við økta samstarvinum á redaktiónunum, eru sendingarnar betri, meiri gjøgnumarbeiddar, meiri upplýsandi og meiri avdúkandi, og hóast kostnaðurin er meiri einstáttaður tíðindaflutningur, er betri journalistkkur ein sigur fyri fólkaræðið, sigur Christian S. Nissen.

Men aðalstjórin leggur dent á, at kapping eisini kann varðveitast, hóast útvarp og sjónvarp verða framleidd í sama bygningi og sama stovni.

- Vit vilja varðveita tvær sjálvstøðugar tíðindaredaktiónir, eisini undir sama taki um hálvt annað ár, og hesar skulu sjálvsagt kappast. Men tá vit meta, at kundin fær ágóðan og betri góðsku við samstarvi framum kapping, samstarva vit heldur, sigur Nissen.

Hann undirstrikar, at kapping er neyðug, men at talan skal vera um eina javnvág. Journalistikkurin kundi sambært Nissen mangan verið betri, um man ikki stardi seg blindan í kapping og í staðin dugdi betri at samarbeiða.

## Føroyskt samstarv

Aðalstjórin á DR ynskir ikki at sita niðri í Keypmannahavn og kommentera føroysk viðurskifti, men hann veit, at bæði sjónvarp og útvarp arbeiða undir sera trongum fíggjarkarmum í Føroyum, og tí ímyndar hann sær, at felags arbeiði og økt samstarv kann betra um loftmiðlagóðskuna og harvið vera gagnligt fyri føroyingar.

- Talan verður sjálvsagt ikki um somu kapping eftir 1. januar í Føroyum, men hinvegin kann journalistikkurin gerast betri, og tá er kundin - fólkið - stóri vinnarin. Vinningurin við samstarvi kann á henda hátt vera størri enn tapið, og tað kann gerast ein sigur fyri tykkara land, sigur aðalstjórin, hóast hann er tilvitaður um, at eingir aðrir veruligir kappingarneytar eru á føroyska loftmiðlaøkinum.

Málið skal sjálvsagt vera, at framleiðslan borgar fyri bæði góðsku og fjølbroytni, men tá fíggjarliga rásarúmi ikki ger hetta gjørligt, má raðfestast og veljast.

- BBC kann saktans seta 400 fólk av til nakrar náttúrusendingar, har góðskan er í topp. Samstundis hava teir orku og tilfeingi til eina ørgrynnu av øðrum tilfari. Vit hava ikki hesar møguleikar í Danmark, og tit hava teir enn minni í Føroyum. Tí má man í hvørjum føri vurdera, hvat tænir fólkinum, og tá hava mínar royndir verið, at økt samstarv elvir til betri góðsku, og júst hetta - vøran til kundan - er tað týdningarmiklasta, sigur Nissen.

## Nógv kann sparast

Eitt høvuðsargument at leggja saman hevur verið umsitingarligar sparingar. Spurdur, hvussu nógvan pening hann ímyndar sær, føroyingar kunnu vinna við eini samanlegging, sigur Nissen, at hann enn einaferð ikki kennir nóg væl føroysk viðurskifti at svara hesum. Men aðalstjórin hevur tó eina meting.

- Mínar royndir siga mær, at nógv kann sparast við samanleggingum. Møguleikarnir gerast betri at gagnnýta tilfeingi til fulnar, og orkan kann koordinerast effektivari. Vit á DR høvdu stórt sæð sama budget fyri tíggju árum síðani, sum vit hava í dag, og vit framleiða tvífalt so nógv tilfar. Hetta sigur eitt sindur um, at bæði meiri og betri tilfar kann fáast til vega, um nøkur felags tøk verða tikin, sigur aðalstjórin á Danmark Radio at enda.